INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

22. februar 2011
Mál: 10/00017-9

Málsviðgerð: HiH

**Uppskot til semju um fígging av eldrarøktini í sambandi við, at økið skal at leggjast til kommunurnar 1. januar 2013**

Eldrarøktin verður løgd til kommunurnar at umsita frá 1. januar 2013. Áðrenn økið verður kommunalt, skal verða gjørd eldralóg, sum skal áseta rammurnar fyri eldrarøktina.

Útleggingin av eldrarøktini verður fíggjað við afturbering og blokkstuðli, umframt ávísari serskipan fyri Sandoy. Hetta verður sett í verk í seinasta lagi 1. januar 2013.

Grundarlagið undir uppskotinum til fígging eru 9 kommunalar eindir

## Tær nýggju kommunueindirnar:

| Komandi kommunur | Núverandi kommunur |
|---|---|
| **Norðoyar** | Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa |
| **Eystur** | Fuglafjarðar og Eystur |
| **Skálafjørðurin** | Nes, Runavíkar og Sjóvar |
| **Sundalagið** | Eiðis og Sunda |
| **Vestur** | Vestmanna og Kvívíkar |
| **Vágar** | Vága og Sørvágs |
| **Suðurstreym** | Tórshavnar |
| **Sandoy** | Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar |
| **Suðuroy** | Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar |

Ein stórur partur av ójavnanum, sum er millum tær 30 kommununum í dag, verður burtur um hesar verða skipaðar í 9 økir. Javnandi ávirkanin av samanlegging kann síggjast teimum tveimum fylgjandi talvunum:

| Skattskyldug inntøka pr. kommunu 2009<br>- samb. skattauppgerðini (í 1.000 kr.) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Kommuna | Íbúgvar | Skattskyldug inntøka | Skattskyldug inntøka/íb. | Index |
| Skopunar | 558 | 68.767 | 123 | 71 |
| Viðareiðis | 355 | 43.802 | 123 | 71 |
| Sumbiar | 377 | 51.125 | 136 | 78 |
| Hvannasunds | 435 | 60.674 | 139 | 80 |
| Fámjins | 108 | 15.103 | 140 | 81 |
| Sjóvar | 1005 | 145.912 | 145 | 84 |
| Kunoyar | 152 | 22.144 | 146 | 84 |
| Vágs | 1364 | 203.477 | 149 | 86 |
| Porkeris | 328 | 50.056 | 153 | 88 |
| Húsar | 57 | 8.870 | 156 | 90 |
| Nes | 1268 | 197.574 | 156 | 90 |
| Klaksvíkar | 4841 | 756.768 | 156 | 90 |
| Hvalbiar | 723 | 113.509 | 157 | 91 |
| Tvøroyrar | 1742 | 275.758 | 158 | 91 |
| Eiðis | 666 | 105.973 | 159 | 92 |
| Skúvoyar | 51 | 8.156 | 160 | 92 |
| Vága kommuna | 1941 | 311.996 | 161 | 93 |
| Sands | 486 | 79.601 | 164 | 94 |
| Fuglafjarðar | 1538 | 256.650 | 167 | 96 |
| Sørvágs | 1140 | 190.827 | 167 | 97 |
| Runavíkar | 3793 | 635.352 | 168 | 97 |
| Hovs | 121 | 20.329 | 168 | 97 |
| Skálavíkar | 164 | 27.956 | 170 | 98 |
| Vestmanna | 1189 | 203.102 | 171 | 99 |
| Húsavíkar | 126 | 21.657 | 172 | 99 |
| Sunda | 1655 | 286.378 | 173 | 100 |
| Eysturkommuna | 1962 | 349.793 | 178 | 103 |
| Kvívíkar | 594 | 107.505 | 181 | 104 |
| Tórshavnar | 19873 | 3.808.794 | 192 | 111 |
| Fugloyar | 38 | 8.370 | 220 | 127 |
| Alt landið | 48.650 | 8.435.978 | 173 | 100 |

Er alt landið sett til index 100, er tað lægsta indexið 71 og hægsta 127 hjá teimum 30 kommununum í dag. Verða kommunurnar lagdar saman í 9 eindir, sær myndin soleiðis út, lægsta indeksið er hækkað upp í 86 og hægsta er lækkað niður í 111:

| Skattskyldug inntøka pr. kommunu 2009<br>- sambært skattauppgerðini (í 1.000 kr.) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Kommuna | Íbúgvar | Skattskyldug inntøka | Skattskyldug inntøka/íb. | Index |
| Norðoyar | 5878 | 900.629 | 153 | 88 |
| Eystur | 3500 | 606.443 | 173 | 100 |
| Skálafjørðurin | 6066 | 978.838 | 161 | 93 |
| Sundalagið | 2321 | 392.351 | 169 | 97 |
| Vestur | 1783 | 310.607 | 174 | 100 |
| Vágar | 3081 | 502.822 | 163 | 94 |
| Suðurstreym | 19873 | 3.808.794 | 196 | 111 |
| Sandoy | 1385 | 206.137 | 149 | 86 |
| Suðuroy | 4763 | 729.357 | 153 | 88 |
| Alt landið | 48.650 | 8.435.978 | 173 | 100 |

# Afturbering

Verða kommunurnar hildnar skaðaleysar í sambandivið teir skattafrádráttir, sum eru í skattaskipanini, eru 253 mió. kr tøkar at flyta til kommunurnar sum fígging í sambandi við, at málsøkir verða flutt til kommunurnar.

| **Endurgjald frá landskassanum vegna skattafrádráttir við meðalskattaprosenti á 21,37:** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **2009** | **Botnfrádráttur** | **Fiskimannafr.** | **Farmask.fr.** | **Uttanl.fr.** | **Tilsamans** |
| Norðoyar | 26.222.656 | 4.418.852 | 751.336 | 450.544 | 31.843.388 |
| Eystur | 15.848.802 | 2.020.898 | 290.663 | 99.883 | 18.260.246 |
| Skálafjørðurin | 27.738.671 | 3.478.191 | 407.623 | 290.016 | 31.914.502 |
| Sundalagið | 10.599.841 | 1.388.116 | 166.764 | 143.637 | 12.298.358 |
| Vestur | 8.289.262 | 1.042.965 | 184.837 | 119.245 | 9.636.308 |
| Vágar | 13.880.370 | 1.904.150 | 433.602 | 287.267 | 16.505.390 |
| Suðurstreym | 90.790.024 | 4.890.762 | 1.687.289 | 1.050.298 | 98.418.373 |
| Sandoy | 6.386.382 | 1.289.605 | 198.702 | 130.827 | 8.005.516 |
| Suðuroy | 21.943.449 | 3.364.901 | 401.273 | 721.289 | 26.430.912 |
| Alt landið | 221.699.457 | 23.798.440 | 4.522.089 | 3.293.007 | 253.312.994 |

Verður roknað við einum meðalskattaprosenti á 21,37 %, fyri at kunna gera samanberingar millum kommunurnar, tá afturberingin verður latin komununum:

| Fyri at kunna samanbera, rokna vit við 21,37 (16.02 netto) sum meðal skattaprosent | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | (í 1.000 kr.) | (í 1.000 kr.) | (í 1.000 kr.) | | |
| **Kommuna** | **skattur** | **afturbering** | **samanlagt** | **pr.íb.** | **index** |
| Norðoyar | 144.281 | 31.843 | 176.124 | 29.963 | 91 |
| Eystur | 97.152 | 18.260 | 115.412 | 32.975 | 100 |
| Skálafjørurin | 156.810 | 31.915 | 188.724 | 31.112 | 94 |
| Sundalagið | 62.855 | 12.298 | 75.153 | 32.380 | 98 |
| Vestur | 49.759 | 9.636 | 59.395 | 33.312 | 101 |
| Vágar | 80.552 | 16.505 | 97.057 | 31.502 | 96 |
| Suðurstreym | 610.169 | 98.418 | 708.587 | 35.656 | 108 |
| Sandoy | 33.023 | 8.006 | 41.029 | 29.624 | 90 |
| Suðuroy | 116.843 | 26.431 | 143.274 | 30.081 | 91 |
| Alt landið | 1.351.444 | 253.313 | 1.604.757 | 32.986 | 100 |

Lægsta indeksið er nú hækkað upp í 90 meðan hægsta er lækkað niður í 108.

## Serskipan fyri Sandoy

Skotið verður upp, at gjørd verður serskipan fyri Sandoy soleiðis, at landið við blokki letur ískoyti til Sandoy, soleiðis at inntøkurnar svara til, at íbúgvatalið hevði verið 2.000 við einum meðalskattaprosenti á 21,37 %.

| Skattskyldug inntøka 2009 - sambært skattauppgerðini | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Kommuna | Íbúgvar | Skattskyldug inntøka | Skattskyldug inntøka/íb. | Ískoyti |
| Sandoy | 1385 | 206.137.003 | 148.835 | 19.560.764 |

## Uppskot til fígging av ekdrarøktini, verður løgd til kommunurnar

Sett verður í verk ein afturberingarskipan, har landið heldur kommunurnar skaðaleysar av teimum frádráttum, sum eru í skattaskipanini t.e. botnfrádráttur, fiskimanna-, farmaskipa- og uttanlandsfrádráttur. Talan er um frádráttir, sum við 2009 tølum geva kommununum ein skattamiss á uml. 253 mió. kr.

Landsins partur av eldarrøktini er í dag uml. 340 mió. kr.[1] Við at seta afturberingarskipan í verk eru 87 mió. kr. eftir at fíggja fyri kostnaðin á eldrarøktini. Tann írestandi fíggingin, verður mælt til, at landið letur kommununum sum blokkstuðul, sum verður roknaður samsvarandi býtinum av eldri í kommununum.

| | 01.01.08 | | býti av 87 mió.kr. | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 67 og eldri | íb. | eldri | íb. | munur |
| Norðoyar | 771 | 5.977 | 11.468.114 | 10.752.667 | 715.447 |
| Eystur | 404 | 3.499 | 6.009.232 | 6.294.727 | -285.495 |
| Skálafjørðurin | 745 | 6.017 | 11.081.381 | 10.824.628 | 256.754 |
| Sundalagið | 259 | 2.281 | 3.852.453 | 4.103.536 | -251.083 |
| Vestur | 262 | 1.830 | 3.897.076 | 3.292.184 | 604.893 |
| Vágar | 421 | 3.005 | 6.262.096 | 5.406.017 | 856.079 |
| Suðurstreym | 2.043 | 19.397 | 30.388.271 | 34.895.347 | -4.507.076 |
| Sandoy | 236 | 1.446 | 3.510.344 | 2.601.365 | 908.979 |
| Suðuroy | 708 | 4.908 | 10.531.031 | 8.829.529 | 1.701.502 |
| Alt landið | 5.849 | 48.360 | 87.000.000 | 87.000.000 | 0 |

[1] Upphæddin er ikki endalig henda er úr fíggjarlógini fyri 2010 og er bruttojáttan til høvuðskontu 12.21.6.04. Eldrarøkt. (339.215 kr. ). Upphæddin sigur einans hvat var játtað á fíggjarlógini við ársbyrjan 2010 til rakstur av økinum, brutto